# Atlantsflog til London

*Komandi summar fer Atlantsflog at flúgva beinleiðis úr Vágum til London eina ferð um vikuna. Rutan til Glasgow verður niðurløgd*



*Flogfarið hjá Atlantsflog lættir sær tann 17. juni komandi ár fyrstu ferð á nýggju rutuni millum Vágar og London*

*Mynd: Jens K. Vang*

Edvard Joensen

Komandi summar fer Atlantsflog at flúgva til London hvønn sunnudag. Talan er um nýggja rutu. Samstundis verður rutan til Glasgow niðurløgd. Flogið verður til London frá 17. juni til seinast í august komandi ár.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, sigur, at ábendingar hava verið um, at føroyingum dámar at ferðast til London. London er stórur og spennandi marknaður, og skotlandsflúgvingin hevur víst, at fólk fara víðari suður eftir úr Glasgow.

Stjórin á Atlantsflog heldur ikki, at tað verður nakar trupulleiki at fáa eina rutu til London at bera til. Samstarvsfelagarnir hjá Atlantsflog í Bretlandi meta, at betri møguleiki verður eisini at fáa bretar hendanveg, um flogið verður til London, sigur Magni Arge.

Hvagar flogið verður til í London er ikki heilt greitt enn, sigur Magni Arge. Heathrow og Gatwick eru sera stórar floghavnir, og ringt kann vera at sleppa fram at har. Eftir er so Stanstead, sum helst verður tann floghavnin, Atlantsflog fer at brúka á síni rutu til London.

Hvør samstarvsfelagin hjá Atlantsflog í London verður, er ikki endaliga avgjørt enn. Men Atlantsflog hevur fyrr samstarvað við bæði SAS og Icelandair, so ikki er óhugsandi, at tað verður annað av hesum feløgunum, sigur Magni Arge. Hann veit heldur ikki enn at siga endaliga ferðaseðlaprísin.

Um summarið, sum farið er, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog, at tað hevur roynst hampiliga væl. Vøksturin í samlaða ferðafólkatalinum í juni, juli og august liggur um 10-12 prosent í mun til somu mánar í fjør, sigur hann.

Í prosentur hevur vøksturin verið størstur á Íslandsrutuni, har hann er umleið 20 prosent. Men fleiri fráferðir hava verið úr Føroyum í ár. Eini 3.000 fólk hava ferðast til Íslands við Atlantsflog í ár, sigur Magni Arge. Eisini á Noregs- og Danmarkarrutunum er ávísur vøkstur. Til Noregs er ferðafólkatalið meira enn tvífaldað hesar tríggjar mánarnar í ár í mun til í fjør. Men tá er eisini ein fráferð komin aftrat.

Á Danmarkarrutunum hevur vøksturin verið eini 12 prosent. Men har vil stjórin ikki upplýsa tøl.

Skotlandsrutan hevur mestsum staðið í stað. Og nú verður Glasgowrutan niðurløgd, meðan flogið fer at verða til London komandi summar.

Magni Arge metir, at pláss er fyri ávísum vøkstri á serliga Íslands- Noregs- og Onglandsrutunum. Hinvegin sigur hann, at sum er, er kapasiteturin í so stórur til hesar ruturnar. Eitt flogfar við 80 stólum flýgur mangan bara hálvfult. So eitt minni flogfar hevði ivaleyst verið betri egnað og heilt givið bíligari í rakstri.

Men nú er støðan tann, at Atlantsflog hevur 80 setur. So er bara eitt at gera. At fylla flogfarið, sum er. Tað metir Magni Arge best at kunna gera við at fáa fleiri útlendingar at feðast við Atlantsflog. Og tað fer felagið so at royna í komandi tíð.

# Byggja skúlan út

*Barnaskúlin á Oyrarbakka er vorðin ov lítil og verður bygdur út, so hann lýkur tey krøv, skúlalógin setir*



*Barnaskúlin á Oyrarbakka verður bygdur út fyri knappliga hálvatriðju millión*

*Mynd: Edvard Joensen*

Edvard Joensen

**Oyrarbakki:** Barnaskúlin á Oyrarbakka, har børn frá Norðskála, Oyrarbakka og Oyri ganga, er vorðin ov lítil og verður nú bygdur út. Byggjast skal upp í skúlan norður eftir, har tvær skúlastovur verða gjørdar. Eisini skal ein forhøll við inngongd byggjast oman úr verandi skúla, har inngongdin er í dag.

Hjalgrím Dahl, bygdarráðsformaður í Sunda Kommunu, sigur, at útbyggingin, farið er undir nú, er neyðug fyri at ganga tí tørvi, sum skúlalógin setir til barnaskúlarnar, á møti.

Skúlin skal millum annað hava teldur, og tað er ikki rætt at seta tær bara onkustaðni hissini í skúlanum, heldur bygdarráðsformaðurin. Tí er neyðugt at hava eina stovu til tær. Og tá hon ikki er til, má hon byggjast uppí, sigur hann. So einfalt er tað.

Útbyggingin verður gjørd í tveimum, sigur Hjalgrím Dahl, bygdarráðsformaður. Fyrra byggistigið er at loka uppíbyggingina norður eftir inni. Annað stigið verður at gera forhøllina og innrætta tilbygningin.

Fyrra byggistigið skal eftir ætlan verða liðugt í ár, meðan restin skal gerast komandi ár. Ætlanin er, at samlaða útbyggingin skal vera liðug og klár at taka í nýtslu komandi skúlaár aftur, sigur bygdarráðsformaðurin í Sunda Kommunu.

Samlaði kostnaðurin fyri útbyggingina verður 2,4 milliónir krónur. Fyrra byggistigið fer at kosta 1,6 millión krónur, sum fara av fíggjaætlanini fyri ár 2000. Restin fer so av komandi fíggjarætlan, sigur Hjalgrím Dahl.

Hann heldur annars, at tann íløguætlanin, sum fíggjarmálaráðharrin hevur boðað frá, man fara at verða rímiliga tronglig hjá fleiri kommunum. Í hvussu er metir hann, at kommunurnar fram við Sundalagnum fara at hava størri tørv, enn tað í løtuni sær út til, at fíggjarmálaráðharrin ætlar teimum.

Barnaskúlin og Felagsskúlin á Oyrarbakka liggja lið um lið, og tí eru góðir møguleikar fyri samstarvi skúlanna millum. Eitt nú er avtala um brúk av fimleikarhøll og slíkum møguleikum, sum Felagsskúlin hevur, og tí ikki er neyðugt at hava í barnaskúlanum eisini, sigur Hjalgrím Dahl, bygdarráðsformaður í Sunda Kommunu.

Eisini aðrir stovnar hjá kommununi brúka Felagsskúlan. Eitt nú eru børnini í Dagstovninum á Oyri eina feð um vikuna í fimleikarhøllini og spæla.



# Rás 2 bjóðar samstarv undan kommunuvalinum

Rás
FM 102
FM 107

*Politisku flokkarnir sleppa undan kommunuvalinum í november fram at mikrofonini í Rás 2, um teir gjalda pengar afturfyri*

Eyðun Klakstein

Rás 2 bjóðar nú politisku flokkunum samstarv undan kommunuvalinum, sum verður í november mánaði.

Í einum skrivi til flokkarnar, sum Sosialurin hevur fingið hendur á, skjýtur Rás 2 upp, at rásin og politisku flokkarnir fara at samstarva upp undir kommunuvalið.

Rás 2 bjóðar flokkunum tvær sendingar saman við verti og tríggjar kjakfundir stutt undan valinum, og fyri luttøkuna í hesum skulu flokkarnir gjalda stívliga 17.000 krónur.

Enn hava allir flokkarnir ikki svarað Rás 2, men Sosialurin hevur skilt, at fleiri flokkar viðgera uppskoti í løtuni, og at í hvussu so er Sambandsflokkurin er sinnaður at verða við.

## Tríggir kjakfundir

Rás 2 ætlar, at hol skal setast á politisku sendingarnar í hesum mánaðinum.

Flokkarnir fáa eina tíma saman við einum verti sum innleiðandi atgerðina undan valinum. Í oktober verður aftur ein tími í part saman við einum verti, og seinastu tvær vikurnar undan kommunuvalinum verða tríggir kjakfundir millum flokkarnar.

Uppskotið hjá Rás 2 umfatar politisku flokkarnar og ikki øki, men sendingarnar verða helst skipaðar soleiðis, at tey snúgva seg um eitt øki í senn. Tað ber illa til hjá kommunalpolitikarum í Havn og Klaksvík at kjakast við hvønn annan, tí annar tosar um vegir í Klaksvík og hin í Havn.

Ætlanin er, at sendingarnar í september og oktober millum annað skulu snúgva seg um flokkarnar sum heild og politisku hugsjónina aftanfyri. Kjakfundirnir fara sum vanligt at snúgva seg um meira ítøkilig mál.

## Umhugsa uppskotið

Sambært uppskotinum hjá Rás 2 skulu flokkarnir gjalda 5000 krónur fyri hvørja av teimum báðum sendingunum í september og oktober mánaði. Og startgjaldið fyri hvønn av kjakfundunum er 2500 krónur. Samanlagt 17.500 krónur fyri hesa senditíð.

Sosialurin hevur tosað við umboð fyri fleiri flokkar, og onkur av hesum umboðunum ivast eitt sindur í tilboðnum frá Rás 2. Fleiri flokkar viðgera í løtuni uppskotið, og skulu síðani boða Rás 2 frá teirra støðu.

Starvsnevndin hjá Sambandsflokkinum hevur longu viðgjørt málið og er sinnað at luttaka.

# Leggur trýst á Dúgvuna

*Eimskip er givið at sigla til Klaksvíkar, og tí skulu byngjurnar, sum felagið flytir úr Klaksvík, umvegis Leirvíksfjørð og koyrast til Havnar. Klaksvíkar býráð er misnøgt við støðuna*

Eyðun Klakstein

Tað fer at leggja størri trýst á Leirvíksfjarðaleiðina, at Eimskip nú er givið at sigla til Klaksvíkar.

Hvørja viku hevur Eimskip flutt millum 10 og 20 byngjur úr Klaksvík, og hesar byngjur skulu framyvir flytast bæði aftur og fram um Leirvíksfjørð.

Frammanundan siglir Dúgvan á tremur við fólki og bilum, og tí kemur byngjuflutningurin at økja trýstið á hesa farleiðina.

– Klaksvíkar býráð kann ikki góðtaka, at útflutningurin fer at økja trýst á Leirvíksfjarðaleiðina og at Klaksvíkar Havn missir inntøkur, sum tað hevur rætt til, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

– Dúgvan siglir sum er á tremur næstan hvønn túr, men vit ætla at klára farmin hjá Eimskip eisini. Um tað verður neyðugt, kunnu vit sigla eykatúrar, sigur Heini á Borg, leiðari av Farmaleiðum hjá Standferðsluni.

## Tænastan

Eimskip er farið at brúka tvey nýggj skip, sum bæði eru størri og sigla skjótari enn skipini, sum felagið brúkti frammanundan. Hetta ger, at Klaksvík er tikið av ferðaætlanini.

Eimskip hevur tó lovað, at felagið fer at bjóða somu tænastu til síni viðskiftafólk í Klaksvík, og hendan tænastan verður, at felagið koyrir byngjurnar suður til Havnar við trailarum.

– Sjálvandi er tað ein fyrstafloks tænasta, at skipið kemur í havn eftir farminum, men vit ætla at gera alt fyri, at okkara kundar í Klaksvík framyvir eisini fáa eina góða tænastu, sigur stjórin á Eimskip, Linda Gunnlaugsdóttir.

Eimskip vil ikki upplýsa, hvussu nógvan farm felagið hevur flutt úr Klaksvík seinastu tíðina, men Sosialurin skilir, at tað vanliga er talan um millum 10 og 20 byngjur.

– Vit ætla at brúka Strandferðsluna, og vit fara eisini at samstarva við tey, fyri at fáa hetta at bera til, sigur stjórin á Eimskip.

## Flyta so hvørt

Dúgvan siglir hvønn dag um 10 túrar millum Klaksvík og Leirvík, men um tað verður neyðugt við eykatúrum framyvir, ætlar Strandferðslan at sigla meira.

– Sjálvandi kemur tað at merkjast, at Eimskip skal flyta byngjurnar við Dúgvuni, men eg kenni meg vísan í, at vit fara at klára hendan flutningin eisini, sigur Heini á Borg.

Eimskip siglir úr Føroyum leygardag, og Heini á Borg heldur, at møguleikar eru fyri at sigla eykatúr fríggjakvøld, um hetta gerst neyðugt.

– Allur flutningurin er ikki í senn, og tí hjálpir tað, um tað ber til at flyta byngjur leypandi gjøgnum fleiri dagar, heldur hann.

## Ágóðin av útflutninginum

Klaksvíkar býráð hevur havt fundarvirksemi um støðuna, sum er íkomin, eftir at Eimskip boðaði frá, at tað fór at gevast at sigla til Klaksvíkar.

– Vit kunnu ikki góðtaka, at tað verður lagt enn størri trýst á Dúgvuna, sum frammanundan hevur truppult við at klára flutningin. Og vit kunnu heldur ikki góðtaka, at Klaksvíkar havn ikki fær fíggjarligan ágóða av tí útflutninginum, sum er úr Klaksvík, tá vit nú hava gjørt stórar íløgur í havnina, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

– Tí fer hvørki havnanevndin ella Klaksvíkar býráð at góðtaka hesa støðuna, og vit fara at venda okkum til skipafeløgini og Vinnumálastýrið, sigur hann.

## Verri umstøður

Jógvan við Keldu sigur, at býráðið ætlar sær ikki at blanda seg uppí, hvat Eimskip ger, men hann heldur tað verða vánaligan handilsmoral, at felagið ikki boðaði býráðnum frá, at tað fór at gevast at sigla til Klaksvíkar.

– Tá Eimskip fór undir at sigla til Klaksvíkar, var leiðslan í felagnum fleiri ferðir á fundi við okkum fyri at finna út av, hvussu alt skuldi fáast at bera til. Men nú teir gevast, hava vit ikki hoyrt eitt orð frá teimum.

– Klaksvíkar havn kemur at missa inntøkur, trýstið á Dúgvuna fer at økjast enn meira og umstøðurnar hjá útflutningsvinnuni í Klaksvík versnar. Tað kunnu vit ikki góðtaka, sigur ein avgjørdur borgarstjóri í Klaksvík




*Nú Eimskip er givið at sigla til Klaksvíkar, fer tað at økja trýstið á Dúgvuna, sum frammanundan siglir so at siga á tremur við bilum og farmi*

Back-up(5)

Tá ið tú goymir dáta á bandi, koma dáta við ávísari ferð, og bandið rennur við ávísari ferð. Men ofta rennur bandið ov skjótt. Tá verður bandið steðgað, tað bakkar, og síðan aftur at renna. Hetta verður nevnt "backhitching". VXA-bandstøðir tillaga ferðina á bandinum eftir ferðini á dátastreyminum (Variable Speed Operation). Úrslitið er: Eingin "backhitching", minni slit og betri trygd.

Sp/f GEYMAR

Tel. 22 17 87 • geymar@post.olivant.fo

Hygg eisini á www.ecrix.com

*Hans Eliesar, Herbein og Snorri Fjallsbak eiga Geymar*

Sosialurin - 311820